UTTAN ÚR HEIMI

# 77 ára gamal kubani gevur USA trupulleikar



*Tann 77 ára gamli Luis Posada Carilles er ættaður úr Kuba, men er venesuelskur ríkisborgari*

*Mynd: Reuters*

**USA aftrar seg við at útflýggja ein flýddan kubana, men trupulleikin er, at hann er skuldsettur fyri yvirgang**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikonsku myndugleikarnir hava fingið ein trupulleika. Teir hava handtikið ein 77 ára gamlan kubana, tí hann er komin ólógliga til USA, men trupulleikin við manninum er, at hann er undir illgruna fyri at hava lagt eina atsókn at einum kubanskum ferðamannaflogfari til rættis í 1976. Tað kubanska flogfarið bleiv sprongt í luftina, meðan tað stóð í floghavnini í Barbados, og 77 fólk lótu lív.

Luis Posada Carilles er venesuelskur ríkisborgari, og myndugleikarnir har hava kravt at fáa hann útflýggjaðan, so hann kann koma fyri rættin í sambandi við atsóknina at kubanska flogfarinum. Politiskir eygleiðarar í Washington siga, at málið er sera óheppið fyri stjórnina hjá George W. Bush, forseta. Forsetin hevur lagt stóran dent á at hjálpa fólki, sum flýggja undan stýrinum hjá Fidel Castro í Kuba, men samstundis hevur hann gjørt bardagan ímóti yvirgangi til sítt fremsta stríðsmál. Tí kemur stjórnin í eina tvístøðu í hesum málinum, skrivar Reuter.

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, hevur gjørt greitt, at USA hevur einki í at velja í hesum máli.

- Heimurin fylgir við, hvat USA nú ger, segði hann fyrradagin.

# Nógvar víðgongdar kreftir í Týsklandi

**Víðgongdir islamistiskir bólkar eru tann størsta hóttanin ímóti týska demokratiinum, men myndugleikarnir halda eisini eyga við nýnazistum og øðrum bólkum**

TÝSKLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein nýggj frágreiðing hjá týsku trygdartænastuni avdúkar, at myndugleikarnir halda eyga við fleiri víðgongdum bólkum og høgra- eins væl og vinstravonginum, samstundis sum neyvt eftirlit er við teimum islamistisku felagsskapunum í landinum.

Frágreiðingin hevur fingið innanríkisráðharran, Oto Schilly, at mæla politikarunum til at geva trygdartænastuni størri heimildir fyri at herða bardagan ímóti teimum víðgongdu islamistisku felagsskapunum. Eitt nú hevur hann skotið upp, at trygdartænastan skal fáa heimild til at kanna bankakontur teirra, og at yvirgangslógirnar, sum komu í gildi aftan á atsóknina 11. september í 2001, verða verandi í gildi.

Myndugleikarnir halda, at 24 islamistiskir felagsskapir eru í Týsklandi, og næstan 200 ferðir hava myndugleikarnir kannað ymisk viðurskifti hjá felagsskapunum, tí illgruni var um, at teir høvdu verið uppi í yvirgangi í Týsklandi.

Í teirri nýggju frágreiðingini hjá trygdartænastuni verður nevnt, at felagsskapurin Al-Qaeda og tríggir aðrir islamistiskir felagsskapir hava fingið fótafesti í Týsklandi, men myndugleikarnir vita ikki, hvussu nógvar limir Al-Qaeda hevur har. Harafturímóti halda myndugleikarnir seg vita, at Hizbollah og Hamas hava ávikavist umleið 800 og 300 limir í Týsklandi, og at tann týska deildin hjá Muslimska Bróðurskapinum hevur umleið 1300 limir.

Otto Schilly ivast ikki í, at teir islamistisku felagsskapirnir eru tann størsta hóttanin ímóti týska demokratiinum, men hann ávarar um, at fólk eiga ikki at gloyma teir víðgongdu felagsskapirnar á høgravonginum. Hildið verður, at næstan 41.000 fólk eru limir í hesum felagsskapunum, og at av teimum eru umleið 5.300 limir í nýnazisiska flokkinum NPD.

## Andstøðan afturgongd

Vinstravenda andstøðan í Noregi fær ein dyggan frammaná í einari meiningakanning, sum bleiv almannakunngjørd í gjár.

Í seinastuni hevur andstøðan havt støðuga framgongd í kanningunum, men nú er vend komin í og tað í ólukkumát. Nýggja kanningin, sum stovnurin Intéra ResearchLab hevur gjørt, gevur Arbeiðaraflokkinum 28,8 prosent, og tað er 1,1 prosentstig minni, enn flokkurin fekk í seinastu kanning. Eisini Miðflokkurin missir eitt prosentstig og fær 5,3 prosent. Tann stóri taparin er kortini Sosialistiski Vinstraflokkurin, sum missir heili 6,5 prosent stig og fær 14 prosent.

Afturgongdin hjá andstøðuni sæst aftur í undirtøkuni hjá stjórnarflokkunum og stuðulsflokki teirra, Framburðsflokkinum. Serliga tann seinasti kann fegnast um gongdini, tí flokkurin fær 3,6 prosentstig afturat og fær 21 prosent. Eisini teir tríggir stjórnarflokkarnir, Høgri, Kristiligi Fólkaflokkurin og Vinstri, hava framgongd.

## Vil ikki hava kanning

Forsetin í Usbekistan, Islam Karimov, vil ikki lata altjóða samfelagið kanna, hvat hendi, tá herurin søkti at einari mótmælisgongu í býnum Andisjan í síðstu viku.

Kofi Annan, ST-aðalskrivari, hevði vent sær til Karimov, men fekk at vita, at usbekisku myndugleikarnir hava tamarhald á støðuni, og at teir fara at gera alt fyri at finna teir ella tey, sum høvdu ábyrgdina av tí, sum hendi. Stjórnin hjá Islam Karimov heldur uppá, at hermenninir skutu ikki eftir sivilfólki, men at tað vóru islamskir uppreistrarmenn, sum elvdu til ruðuleikan.

Usbekiska stjórnin sigur, at 169 fólk lógu eftirá, men andstøðan vil vera við, at talið var nógv størri. Sambært andstøðuni doyðu umleið 500 fólk í Andisjan og umleið 200 í býnum Pakhtabad, tá hermenn skutu inn í mótmælisgongur í teimum báðum býunum.

Fleiri útlendskir diplomatar og tíðindamenn vóru mitt í vikuni í Andisjan eftir innbjóðing frá stjórnini, men stjórnin ansaði væl eftir, at teir sluppu ikki at tosa við onnur enn umboð fyri myndugleikarnar, skrivar AP.

## Løgreglumenn í geglið

Tveir svenskir løgreglumenn skulu sita ein mánað í fongsli. Ein starvsfelagi teirra skal gjalda 30.000 krónur í bót, men allir tríggir sleppa kortini at halda fram í løgregluni.

Upprunin til málið var ein tilburður í býnum Tæby í apríl í fjør, tá ein 19 ára gomul kvinna bleiv drigin inn ímillum nakrar runnar og neyðtikin fleiri ferðir. Tað eydnaðist henni at ringja til eina vinkonu og at siga henni frá, at hon bleiv neyðtikin, men so slitnaði sambandið. Vinkonan ringdi alt fyri eitt til løgregluna, men kortini gjørdi løgreglan einki.

Í rættinum greiddu teir tríggir løgreglumenninir frá, at vinkonan visti ikki at siga, hvar kvinnan bleiv neyðtikin, og tí hildu teir seg ikki hava nóg neyvar upplýsingar, til at teir kundu senda ein løgreglubil at kanna málið. Men dómarin helt, at teir áttu at havt kannað málið nærri. Tað gjørdu teir ikki, og tí skulu tveir teirra í fongsul, og tann triði skal rinda bót.

## Illir indiánar

Umleið 400 indiánar hava kringsett partar av einari verksmiðju í landspartinum Espirito Santo í Brasil, tí teir vilja vera við, at verksmiðjan hevur tikið teirra jørð.

Tað er eitt norskt felag, sum eigur verksmiðjuna, men stjórin, Erling Lorentzen, sigur við Aftenposten, at hann hevur ikki tikið jørð frá indiánunum. Erling Lorentzen sigur, at felag hansara hevur keypt jørðina frá teimum lokalu myndugleikunum og frá privatum eigarum, og at felagið hevur tey neyðugu skjølini, sum prógva, at keypið var lógligt.

Men indiánarnir halda uppá, at norska felagið hevur snýtt teir, og teir hava tí lagt sak ímóti felagnum. Erling Lorentzen væntar kortini ikki, at indiánarnir fara at vinna sakrmálið, tí so má øll tann brasilska lóggávan um ognarviðurskifti broytast, sigur hann við Aftenposten.